Búskapur og vinna:
## Heldur minni avlop

Avlopið á danska gjaldsjavnanum frá november til januar var heldur minni enn somu mánaðir fyri einum góðum ári síðani. Frá 1. november 2001 til 31. januar 2002 var avlopið 6,0 mia. krónur ímóti 7,5 mia. krónum frá november 2000 til januar 2001.

Sambært Danmarks Statistik var avlopið á danska gjaldsjavnanum 34,9 mia. krónur frá februar í 2001 til januar í 2002. Tað var 8,8 mia. krónur meiri enn somu tólv mánaðar frammanundan.

## Nokia fellur

Virðið á partabrøvunum í finsku fyritøkuni Nokia hevur verið fallandi, síðani leiðslan boðaði frá, at fyritøkan hevur selt færri fartelefonir enn væntað. Á partabrævamarknaðinum í Helsinki fall virðið 3,8 prosent.

Noka sigur, at fartelefonsølan hevur eisini verið minkandi higartil í ár. Í januar boðaði fyritøkan annars frá, at hon væntar at selja millum 420 og 440 milliónir fartelefonir í ár. Enn hevur fyritøkan ikki sagt, um fallið teir báðar fyrstu mánaðarnar fer at ávirka sølumetingina fyri árið.

## Bjóða Carlsberg av

Nøkur meðalstór norðurlendsk bryggjaríir hava tikið seg saman í einari roynd at bjóða danska Carlsberg av. Avbjóðararnir eru svenska Spendrup, norska Hansa Borg Bryggerier og danska Bryggerigruppen, sum umfatar m. a. Ceres, Albani og Faxe.

Stjórin í Bryggerigruppen, Jørgen Worming, sigur, at tað er umráðandi, at tey norðurlendsku bryggjaríini røkka viðskiftafólkum í øllum Norðurlondum. Tað ger Carlsberg, og tað ætla vit eisini at gera við nýggja samstarvinum, sigur Jørgen Worming.

Kunngerðin um samstarvið bar í sær, at virðið á partabrøvunum í Bryggerigruppan hækkaði 4,3 prosent á Børsinum í Keypmannahavn mikudagin.

UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael virkar ikki fyri friði

**Amerikansku atfinningarnar ímóti tiltøkunum hjá ísraelska herinum eru vorðnar sjáldsama hvassorðaðar.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Á einum tíðindafundi í Washington mikukvøldið duldi amerikanski forsetin, George W. Bush, ikki fyri, at hann er sera misnøgdur við framferðina hjá ísraelska herinum í teimum palestinsku sjálvsstýrisøkjunum.

- Satt at siga haldi eg, at framferðin, sum Ísrael hevur nýtt í seinastuni, hevur ikki bøtt um støðuna. Eg skilji væl, at teir royna at verja seg ímóti yvirgangi, men tað, sum teir hava gjørt seinastu dagarnar, loysir ongar trupulleikar, segði Bush.

Eygleiðarar í Washington siga, at amerikanski forsetin hevur ongantíð verið so hvassorðaður í sínum atfinningum at Ísrael fyrr. Fyrr hevur Colin Powell, uttanríkisráðharri fleiri ferðir funnist at ísraelsku stjórnini og átøkunum hjá herinum, men hetta er fyrstu ferð, at forsetin sjálvur hevur verið so greiður, siga eygleiðararnir.

Samstundis bendir nógv á, at amerikanska stjórnin er í ferð við at revsa Ísrael. Stjórnin hjá Ariel Sharon hevur biðið USA økja ta búskaparligu hjálpina sjey milliardir dollarar, men mikukvøldið boðaði stjórnin í Washington frá, at umsóknin verður ikki gingin á møti.



-Tað, sum ísraelski herurin hevur gjørt í seinastuni, loysir ongar trupulleikar, segði ein avgjørdur George W. Bush á tíðindafundi í Washington

*Mynd: Reuters*

Ísrael fær sum er næstan 27 milliardir dollarar í búskaparhjálp úr USA um árið. Stjórnin hjá Bush hevði ætlað at økt stuðulin 1,8 milliard dollarar, men tann endaliga avgerðin er útsett. Keldur í Washington siga, at amerikanska stjórnin er ikki serliga sinnað at lata Ísrael størri stuðul, so leingi herurin heldur fram við sínum atgerðum í teimum palestinsku økjunum.

Hóast ST-trygdarráðið mikunáttina samtykti eina yvirlýsing um Miðeystur og bað partarnar binda frið, hevur ófriðurin hildið fram, og í gjár skutu ísraelskir hermenn tríggjar palestinar. Samstundis ljóðaði, at herurin hevði tikið einar 40 stríðsvognar úr býnum Ramallah, men at 60 aðrir stríðsvognar framvegis standa í býnum.

Síðani ófriðurin í Miðeystri tók seg upp fyri 17 mánaðum síðani, hava 1.175 palestinar og 340 ísraelsmenn latið lív.

# Ivi um talið á deyðum

**Amerikanska verjumálaráðið sigur, at meiri enn 800 hermenn hjá al-Qaeda eru deyðir í bardøgunum í Afghanistan í seinastuni, men stóra blaðið New York Times ivast í upplýsingunum**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Í síðstu viku kunngjørdi amerikanska verjumálaráðið Pentagon, at teir taldu ikki, hvussu mangir hermenn hjá al-Qaeda doyðu í bardøgunum í fjøllunum har eysturi í Afghanistan.

Men mánadagin skrivaði stóra amerikanska blaðið New York Times frá keldum í verjumálaráðnum, at 517 arabiskir, kekenskir og aðrir hermenn hjá al-Qaeda vóru deyðir í bardøgunum. Hildið varð, at einir 250 aðrir vóru deyðir, og í gjár segði ein tænastumaður í Pentagon fyri New York Times, at nú var talið komið upp á 800.

New York Times segði seg í gjár ivast í tølunum hjá verjumálaráðnum. Blaðið skrivar, at talið á deyðum verður gjørt upp eftir frásagnum frá tyrlumanningum, ómannaðum flogførum og frá hermonnum, sum skjóta eftir fíggindastøðunum í fjøllunum. New York Times ger vart við, at eingin av hesum veit, hvat hendir inni í teimum nógvu holunum, ella hvussu mong doyðu, tá amerikansk bumbuflogfør herfyri løgdu tvær bygdir fullkomiliga í oyði.

Sambært blaðnum hava nøkur tíðindafólk júst verið í teimum báðum oyðiløgdu bygdunum, og har funnu tey bara trý lík av monnum, sum kunnu hava verið hermenn hjá al-Qaeda.

New York Times heldur, at tænastumenninir í verjumálaráðnum tora ikki at upplýsa tað veruliga talið á deyðum. Undir Vietnamkrígnum varð talið kunngjørt, og tá fekk USA hvassar ábreiðslur fyri at fara alt ov harðliga fram.

Metingin hjá blaðnum samsvarar eisini væl við tað, sum Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri segði í samrøðu við sjónvarpsstøðina CBS fyrr í vikuni:

- Vit telja ikki teir deyðu. Vit royndu í Vietnam, og tað gekk ikki so væl, segði Rumsfeld.

Úr Norðurlondum:
## Máttu flyta kong

Norska løgreglan bar skjótt at, tá ein bumbuhundur hjá løgregluni helt seg hava funnið spreingievni í einum bili, sum stóð tætt við eini hús, har Haraldur kongur var og vitjaði. Løgreglan boðaði lívverju kong frá, og kongur varð í skundi fluttur burtur haðani.

Samstundis handtók løgreglan mannin, sum átti bilin. Tað var ein maður úr Irak, sum kom til Noregs fyri einum ári síðani. Bilurin varð síðani kannaður, men bumba var eingin at finna. Løgreglan heldur, at hundurin man hava mistikið seg.

Tilburðurin var í Sør Trøndelag mikudagin.

## Tað var eg

Ein svenskur kurdi boðaði mikudagin løgregluni í býnum Uppsala frá, at tað var hann, sum drap ta 26 ára gomlu kurdisku kvinnuna Fadime Sahindal. Fyrr hevur faðir hennara viðgingið, at hann skeyt dóttur sína, og tað gjørdi hann eisini, tá hann varð avhoyrdur í rættinum týsdagin. Hetta váttaði mamman eisini, tá hon varð avhoyrd mánadagin.

Maðurin, sum nú sigur seg vera tann rætta drápsmannin, kendi kurdisku fólkini í Uppsala, hóast hann ikki búði har á leið. Men svenska løgreglan trýr honum ikki.

## Kanna nýsu

Seinastu árini hava donsk vísindafólk lagt stóran dent á at kanna teir ymsu hvalastovnarnar, sum halda til í donskum sjógvi, og tað hevur borið í sær, at hesir stovnarnir eru rættiliga væl lýstir í dag.

Men nú skal nýsan eisini kannast. Ætlanin er at fáa fólk at boða frá, hvørja ferð tey bera eygað við eina nýsu. Donsku vísindafólkini halda, at einar 300.000 nýsur eru í Norðsjónum, og at einar 35.000 teirra halda til í donskum sjógvi.

# ítróttur

Nr. 52 • fríggjadagur • 15. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

### 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 10 - 0 - 0 | 638 | 393 | 245 | 32 |
| 2 | Neistin | 11 | 7 - 1 - 3 | 528 | 452 | 76 | 23 |
| 3 | Stjørnan | 10 | 5 - 1 - 4 | 533 | 461 | 72 | 20 |
| 4 | VB | 10 | 6 - 1 - 3 | 518 | 520 | -2 | 19 |
| 5 | StÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 430 | 516 | -86 | 9 |
| 6 | Kyndil | 10 | 1 - 1 - 8 | 493 | 584 | -91 | 6 |
| 7 | Sóljan | 11 | 1 - 0 - 10 | 429 | 643 | -214 | 5 |

# Botnslagið verður í kvøld

**Í kvøld – fríggjakvøldið - fellur avgerðin um niðurflytingina úr bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Undan kappingarbyrjan vóru tað fá, sum væntaðu at so fór at verða, og fyri tveimum árum síðani var bara tankin óhugsandi. Á næst seinasta leikdegi skal kvinnuliðið hjá Kyndli stríðast fyri lívinum í bestu kvinnudeildini. Fríggjadagin fara tær vestur í Vágoynna, har dystur móti Sóljuni er á skránni.

### Viljin

Ikki tí. Sum seinasta árið og gott og væl tað hevur lagað seg, so kann ikki sigast annað enn, at tað í løtuni er sera langt frá gullárunum hjá Kyndli og til støðuna í dag. Frá at vera liðið, sum saman við Neistanum domineraði føroyskan kvinnuhondbólt, er liðið broytt til eitt botnlið í bestu deildini, og nú avgerandi dysturin móti niðasta liðnum í deildini stendur fyri framman, so kann Kyndil ikki á nakran hátt rópast fyri favorittur.

Kanska eru fleiri, sum vilja peika á, at Kyndil á pappírinum hevur ein sterkari leikarahóp, og tað er einki at ivast í, at tey í Sóljuni væl kundu hugsað sær leikarar sum eitt nú Anniku Ljósstein og Lotte Sørensen á liðnum. Hinvegin er heldur einki at ivast í, at tey í Kyndli væl kundu hugsað sær tann stríðsvilija, sum hevur eyðmerkt Sóljuna.

Í fjør vórðu tær mettar sum sjálvskrivaðir niðurflytarar, men á seinasta leikdegi vendu tær øllum á høvdið, tá tær ístaðin sendu Tjaldur eina deild niður, og tað er als ikki óhugsandi, at tær megna tað sama, tá Kyndil nú kemur á vitjan.

### Dramatikkur

Støðan undan dystinum er annars tann, at Kyndil er eitt stig framman fyri Sóljuna, og tær hava eisini ein dyst til góðar í mun til vágaliðið. Hinvegin er einki at ivast í, at dysturin í kvøld verður hin avgerandi. Seinasti dysturin er ímóti VÍF, og tað er meira enn trupult at ímynda sær, at nakað skal spyrjast burtur úr hesum.

Einsamalla stigið ger tó, at meðan Kyndil kann liva við einum javnleiki, so er tað alneyðugt hjá Sóljuni at vinna. Líkindini fyri einum sigri eru kanska heldur ikki heilt eingi, tí tær báða seinastu ferðirnar, tær hava spælt móti Kyndli, hevur Sóljan vunnið, eftir at Kyndil annars vann fyrsta dystin í ár millum liðini.

Undir øllum umstøðum er líkt til, at áskoðararnir fáa dramatikk og spenning fyri pengarnar, tá dysturin verður blástur ígongd kl. 18.00 fríggjakvøldið.



*Avgerðin um niðurflytingina úr bestu kvinnudeildini fellur í kvøld, tá Sóljan á heimavølli tekur ímóti Kyndli*

# Stuðlaðu renningini

**Peningur skal til og leikarar í VB runnu leygardagin sonevnda stuðulsrenning kring Vatnið. Fólk tóku væl undir og stuðlaðu tiltakinum við at seta pening í veð fyri hvønnkilometur, runnið varð**



*Vágbingar tóku væl undir við tiltakinum, tá VB leikarar runnu stuðulsrenning leygardagin. Eisini veðrið var til vildar, hóast kalt var*

*Mynd: D.Olsen*

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*

Leygardagin runnu leikarar úr 1. deild, 2. deild og unglingadeildini hjá VB stuðulsrenning. Fólk kundu seta ávísa upphædd í veð fyri teinin, ein leikari rann tann tíman, rennngin fór fram.

Vágbingar tóku væl undir við tiltakinum, har eisini vedding fór fram um, hvussu langt leikararnir runnu í alt. Talið var 303 kilometrar.

Eini 26 leikarar runnu. Hann, ið rann longst, rann 16 kilometrar. Hetta var Gisli Sveinbjørnsson, ið rann kring Vatnið 12 ferðir. Annars løgu teir flestu um eini 15, 13 og 12 kilometrar og niður í 5 kilometrar.